# Semingsmenn kunnu ikki finna semjur

**Nýtilnevndu semingsmenninir hava staðið fyrstu royndina**

SEMINGSMENN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



– Tað ber ikki til hjá semingsmonnum at finna semju. Tað einasta, semingsmenninir kunnu gera, er at hjálpa tveimum pørtum á glið í royndunum at finna semju. Men tað eru altíð partarnir einsamallir, sum mugu finna semjurnar. Tað sigur Terji Sigurðsson. Terji Sigurðsson er nýtilnevndur semingsmaður.

Og júst tað at royna at hjálpa pørtunum á glið, heldur hann er ein stór ábyrgd, tí av og á hevur mikið stríð verið um semingsmenninar.

– Tað er ein stór avbjóðing at fara í holt við, sigur hann.

Og tey næstu trý árini verður tað hansara lutur, saman við varamanninum, Jóannesi Djurhuus, at royna at fáa partarnar á arbeiðsmarknaðinum at semjast, tá ið sáttmálasamráðingar eru, og arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar ikki fáa loyst knútarnar sjálvir.

Terji Sigurðsson er 47 ára gamal og útbúgvin innan samfelagsfrøði.

Hann hevur verið skrivari í kappingarráðnum í nøkur ár, men áðrenn tað arbeiddi hann í ALS.

– Tað hevur givið mær eitt ávíst innlit í arbeiðsmarknaðin, sum kemur mær til nyttu í starvinum sum semingsmaður og hann heldur, at tað onkusvegna má vera tað, hann hevur starvast við, sum hevur fingið myndugleikarnar at meta, at hann er skikkaður til starvið sum semingsmaður.

*Tað er ein stór avbjóðing at vera semingsmenninir, men tað eru para partarnir, sum samráðast, ið kunnu finna semjurnar, sigur nýtilnevndi semingsmaðurin, Terji Sigurðsson*

### Stóðu fyrstu royndina

Og skulu vit meta eftir fyrstu royndini, má sigast at hana stóðu semingsmenninir.

Týsdagin eydnaðist tað teimum at fáa Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag øðrumegin og Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Føroyskra Handverkaranna hinumegin, at semjast um ein nýggjan sáttmála.

Tá høvdu partarnir sitið til samráðingar við semingsmonnunum í 33 tímar út í eitt og semingsmaðurin væntar avgjørt, at alt hansara starv sum semingsmaður verður líka positivt sum hendan fyrsta semingsroyndin.

Sáttmálin sum handverksmeistarar og handverkarar hava skrivað undir við, er ein tvey ára sáttmáli. Hann er á leið á sama støði sum aðrir sáttmálar, men í hesum føri hava partarnir gjørt av at leggja lutfalsliga meir upp á eftirlønina og afturfyri verður beinleiðis lønarhækkingin lutfalsliga minni.

Eftir nýggja sáttmálanum hækkar tímalønin 2,77 krónur 1. oktober í ár og sostatt er tímalønin hjá Handverkarum nú 110,97.

Tímalønin hækkar aftur 2,72 1. oktober 2004 og tá verður tímalønin 113,69 krónur.

Hinvegin hækkar eftirlønin 2% tann 1. oktober 2003 og tá verður hon 4%. Tann 1. oktober 2004 hækkar eftirlønin aftur 1,5% og tá verður eftirlønin 5,5%. Samstundis hækkar halgidagsgrunnurin 0,5% tann 1. oktober næsta ár og tá verður 1,5%

Tilsamans er talan um 8,5% í hækkingum.

# Tað skal vera meiri arbeiði á fiskavirkjunum í Føroyum

**Ein bólkur av vinnulívsfólki og serkønum skal nú gera eina nágreiniliga kanning av, hvussu tað ber til, at føroysk virki ikki eru kappingarfør, so at nógvur fiskur av tí sama fer óvirkaður av landinum**

AVREIÐINGAR UTTANLANDS
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skal ein nevnd skal setast at kanna, hvussu tað ber til at so nógvur fiskur fer óvirkaður av landinum.

Nú fíggjarlógin fyri næsta ár hevur verið til viðgerðar, heitti Henrik Old, løgtingsmaður, á landsstýrismannin í fiskivinnumálum um at taka stig til at seta eina slíka nevnd.

Men hann metir, at tað hevur so mikið stóran týdning at ein slík nevnd verður sett, at hann sigur samstundis, at tekur landsstýrið ikki stig til at seta hana, fer javnaðarflokkurin sjálvur at gera tað.

### Øll orsøk at rópa varskó

Henrik Old sigur, at tað er øll orsøk til at rópa varskó um allan fiskin, sum fer óvirkaður av landinum.

Hann leggur eisini afturat, at hetta er ein trupulleiki, sum hevur vundið nógv uppá seg seinastu tíðina.

Og soleiðis, sum útlitini eru, bendir alt á, at tað verður uppaftur nógv verri framyvir, tí allar metingar siga, at fiskiskapurin hjá ES londunum fer at minka og sostatt fer tørvurin á fiski hjá fiskavirkjum í ES londunum alsamt at veksa. Avleiðingin er, at tað fer at vera enn størri gravgangur eftir fiski frá føroyskum skipum.

Hann hevur ongi tøl at halda seg til, men hann hevur tosað við nógv virkið runt um í landinum og hann hevur týðiliga fingið at vita, at tey verða minni og minni før fyri at keypa fisk og at trupulleikin nú er ovurhonds stórur.

Og í Degi og Viku hóskvøldið, greiddi fíggjarstjórin í Føroya Fiskavirking frá, at sjálvt landsins nógv størsta fyritøka í fiskivinnuni, hevur alstórar trupulleikar av at kappingarførið er nógv versnað seinastu tíðina og at tað eisini er ógvuliga trupult hjá Fiskavirking at keypa fisk.

### Lýsa trupulleikan og finna loysnir

Henrik Old sigur, at hann er ikki úti eftir at seta reglar í gildi sum skulu avmarka møguleikarnar hjá føroyskum skipum at avreiða uttanlands.

Hann ætlar heldur ikki á annan hátt at avmarka møguleikarnar at flyta óvirkaðan fisk av landinum.

Men hann heldur, at tað er staðiliga brúk fyri at kanna nágreiniliga, hvussu tað ber til, at føroysk virki ikki eru kappingarfør.

– Vit eiga at gera eina nágreiniliga lýsing av, hvussu tað ber til, at føroysk virki ikki klára at kappast um fiskin við tey útlendsku virkini.

Hann sigur, at ikki, fyrrenn trupulleikin er væl og virðiliga lýstur, ber tað til av álvara at viðgerða, hvussu loysnir kunnu finnast og hann heldur, at tað eigur at fáa meginpartin av Løgtinginum at semjast um eina loysn á trupulleikunum.

– Endamálið má vera at skipa so fyri, at tað heilt einfalt skal loysa seg hjá skipum at avreiða í Føroyum og tað skal loysa seg hjá føroyskum virkjum at keypa og virka fisk.

Hann sigur, at nú hann hevur tosað við ymisk virki runt um í landinumm hevur hann greitt fingið at vita, at ein stórur trupulleiki hjá virkjum í útjaðaranum er, at tey hava nógv størri flutningskostnaðir enn virkini inni á meginlandinum.



*Hvørki virki ella arbeiðsfólk kunnu liva av at hava arbeiði ein dag um vikuna og nú fer meiri fiskur óvirkaður av landinum enn nakrantíð fyrr. Tí hevur tað alstóran týdning at kanna, hví so nógvur fiskur fer óvirkaður av landinum, sigur Henrik Old. Fleiri aðrir politikarar taka undir við honum*

### Ikki politikarar

Løgtingsmaðurin úr Suðuroy heldur eisini, at nevndin, sum skal viðgera trupulleikan, skal ikki vera mannað við politikarum.

Hon skal heldur ikki verða mannað við embætisfólki í miðfyrisitingini.

– Eg haldi, at tað hevur stóran týdning, at nevndin verður mannað við fólki, sum dagliga merkja trupulleikan á egnum kroppi, eitt nú vinnulívsfólki og øðrum serfrøðingum kring landið. Henrik Old heldur, at tað er av størsta týdningi at gera hesar kanningarnar.

– Bíða vit ov leingi, er vandi fyri, at alt ov nógv fiskavirki kring landið ikki hóra undan. Og nú man tað vera meiri enn ivingarsamt, hvat er eftir av vágafúsum pengum úti um landið at endurreisa virkini fyri einaferð afturat, tí fleiri virki eru farin á húsagang eina og tvær ferðir seinastu árini og spurningurin er um tey tola at fara einaferð afturat. Hann heldur, at feiri virki úti um landið eru longu væl á veg at fara á húsagang.

– Onki virki og ongi arbeiðsfólk kunnu liva av at arbeiða ein dag um vikuna, ella hálvanannan. Tá ið virksemið er á so lágum støði, er tað onki annað enn ein bíðistøða, til lykilin verður snaraður ordiliga og tá er skaðin fullkomin og endaligur.

Hann heldur, at hetta málið hevur sera stóran týdning, tí dettur fiskivinnan úti um landið niðurfyri, dugir hann ikki at síggja, hvat slag av vinnulívið skal vera í útjaðaranum.

Nú fíggjarlógin var til viðgerðar, tóku fleiri aðrir løgtingsmenn undir við Henrik Old um, at hetta var ein trupulleiki, sum eigur at verða tikin upp.



# Internetið knýtti vinabond

**Sjeyndi flokkur í Sørvágs Skúla hevur í nøkur ár havt samband við ein flokk í Aalborg, har flestu næmingarnir eru fluttir til Danmarkar úr krígsherjaðum londum**

VINASAMBAND
*Edvard Joensen*



*Tað eru teldurnar, sum hava bundið sjeynda flokk í Sørvágs Skúla saman við vinaflokkinum í Mellemvangskolen í Aalborg*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Sørvági:** Sjeyndi flokkur í Sørvágs Skúla hevur ein vinaflokk í Aalborg í Danmark, har flestu næmingarnir eru flutt til Danmarkar úr krígherjaðum londum. Tey hava vitjað hvønn annan, og ætla at halda fram at hava samband.

Sambandið flokkanna millum tók seg upp, tá skúlin í Sørvági fyri nøkrum árum síðan fekk teldur og internetsamband.

Næmingarnir fóru at brúka teldurnar og funnu sær so fram til ein skúla í Danmak, sum tey hildu, at stuttligt kundi verið at havt samband við. Tey leitaðu sær fram á Mellemvangskolen í Aalborg og funnu ein flokk, sum var á sama aldri, sum tey sjálv.

– Hetta sambandið hevur heilt greitt ment næmingarnar her hjá okkum, sigur flokslærarin, Eyð Niclasen. Bæði í skrift og talu á donskum. Tey eru nógv fríari í so máta, nú tey hava havt regluligt samskifti við donsku næmingarnar, og báðir flokkarnir eisini hava vitjað hvønn annan.

### Fleirtjóða flokkur

Sambandið við vinaflokkin í Aalborg hevur verið mennandi upp á fleiri mátar, sigur flokslærarin hjá sjeynda flokki í Sørvágs Skúla.

Danski flokkurin er samansettr av børnum av rættiliga ymiskum uppruna. Ein sonevndur »multietniskur« flokkur. Og talan er um fólk, sum komin eru úr krígsherjaðum londum sum Bosnia, Irak, Libanon og Somalia. Tey eru fleiri av fremmandum uppruna, enn tey eru danir í danska flokkinum, greiða sørvingarnir frá.

Hetta hevur í ávísum førum givið børnunum nakað at hugsa um, sigur Eyð Niclasen og nevnir eitt dømi, har ein genta í danska flokkinum brádliga var burtur og ikki kom aftur.

Tað vísti seg, at mamman hevði verið í gamla heimlandinum við gentuni og eftir sum siðurin var har gift hana burtur. Tað er greitt, at slíkt er nakað, børnini leggja merki til og eisini tosa um.

Hetta, at børnini í danska flokkinum høvdu so ymiskan uppruna, hevði ikki sørt av ávirkan á føroyingarnar, áðrenn tey rættiliga komu at kenna hesi fólkini, siga tey í sjeynda flokki í Sørvágs Skúla. Summi vóru eitt sindur í iva um, hvussu hetta fór at spæla av, men tá tey so fyrst vóru komin í samband við tey, var alt slíkt beinleiðis veruleikafjar hugsan.

– Eitt rættiliga gott dømi um, hvussu umráðandi tað er at møta fólki og læra tey at kenna persónliga heldur enn bara út frá slíkum tú hoyrir og lesur, staðfestir flokslærarin.

### Hittast

Flokkarnir báðir hava hitst í summar. Fyrst vóru donsku børnini í Føroyum og vitjaðu, og síðan vóru sørvágsbørnini í Aalborg.

Donsku børnini komu til Føroya í mei mánað, og báðir flokkarnir fóru beinanveg nakrar dagar til Nesvíkar, har búð varð í Leguhúsinum.

Eitt frálíkt høvi at sjóða fólkini saman, soleiðis at øll komu at kennast væl, áðrenn farið varð til Sørvágs, har tey búðu privat.

Donsku børnini vistu ikki so øgiliga nógv um Føroyar, tá tey komu higar, siga sørvágsbørnini. Men tann kunnleikin var munandi betri, tá tey fóru avstað aftur.

Seinni í summar vóru sørvágsbørnini so í Aalborg og vitjaðu. Og tað var ein góður túrur, láta tey at.

Danski flokkurin hevur í ár skift flokslærara, og tað ger so, at eitt sindur av stígi er komið í sambandið beint nú. Men tað skal ikki vera leingi, siga tey í Sørvági. Tí tey ætla sær at taka sambandið uppaftur á sama støði, sum áður hevur verið.

Men slept sambandinum hava tey avgjørt ikki, siga tey. Tað verður dúgliga samskift umvegis SMS og e-mail, sum eru léttir hættir at halda samband viðlíka.

### Vilja kunna onnur

Tað er við stuðuli frá Norrøna Felagnum og Atlantsflogi, at samstarvið við danska skúlaflokkin er vorðið gjørligt, greiðir Eyð Niclasen, flokslærari hjá sjeynda flokki í Sørvágs Skúla, frá.

Tað er møguligt hjá skúlaflokkum, sum ætla sær at vitja aðrar flokkar í Norðurlondum, at søkja stuðul haðani, sigur hon. Umsóknin skal vera latin nakað skjótt. Einaferð í november er seinasta freist at søkja.

Tann stuðulin, tey fingu frá Norrøna Felagnum saman við stuðuli og vælvild frá Atlantsflogi fíggjaði í rættiliga stóran mun ferðina hjá teimum, siga tey.

Men tað er krevjandi at halda slíkt samband viðlíka, sigur flokslærarin. Tað krevur rættiliga nógva tíð, sum í stóran mun verður brúkt uttan fyri vanliga skúlatíð. Men tað er sera mennandi bæði fyri næmingar og lærarar at hittast soleiðis, siga tey í sjeynda flokki í Sørvágs Skúla.



*Eyð Niclasen, sum er flokslærari hjá sjeynda flokki í Sørvágs Skúla, sigur, at tað er mennandi bæði fyri næmingar og lærara at vitja fremmandar skúlaflokkar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*